# Tiltøk

**Fríggjakvøldið 17. sept.**
**Glyvra kirkja:** kl. 21
Náttarkirkjan

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Olgu Magnussen, Lamba. Evni: Hví havi eg virði?

**Miðvika í Hoyvíkar kirkju**
Mikukvøldið kl. 19 er Miðvika í Hoyvíkar kirkju. Ann Dahl Hansen, prestur fer at hugleiða um evnið: Tann modernaða barnafamiljan. Til ber at seta spurningar. Ein kaffimunnur er. Tiltakið er í kirkjukjallaranum, og øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudagin
kl. 15 Bønarmøti.
kl. 19 Cellegruppa fyri kvinnur
kl. 19 Andakt á Vallalíð.
kl. 19 Andakt á Sambýlið Hoyvík
Hósdagin
kl. 20 Heimaforbundið.
Sunnudagin
kl. 11 Halgunarmøti.
kl. 11 Sunnudagsskúlin.
kl. 17.30 Bøn.
kl. 18 Møti.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikudagin kl. 17.15
Barnakórið venur.
Sunnudagin kl. 11
Morgunmøtið (ongin sunnudagsskúlið)
www.gospel.fo

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og lærumøti. Øssur Berghamar og Andrew Berghamar tala.
Hóskvøldið kl. 20
Ungdómsmøti. Høgni Johannesen talar um evnið "Hví loyvir Gud lýðing".
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Jógvan Purkhús talar. Barnaansing er meðan møti er. kl. 12 Sunnudagsskúli.
kl. 18 Evangelisktmøti.
Øssur Berghamar og Andrew Berghamar tala.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøldið kl. 20 Felagskóri venur. Hóskvøldið kl. 20
Ungdómsmøti v/ Thomas Wind. Sunnudagin kl. 14
Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v/ Jónsvein Joensen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Katólska Kirkjan**
Mánadag til fríggjadag kl. 17.30 messa í Kerit.
Fríggjadag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa v/Mikolaj Kecik, prestur í Mariukirkjuni.
sunnudagsskúli kl. 14
www.katolsk.fo

**Samkoman Marknagil Fjalsgøta 2, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 10.30
Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Tórshavnar Hvítusunnu-samkoman yviri við Strond**
Morgunmøti kl. 11 við breyðbrótilsi. Møti er sunnukvøldið kl. 18. Øll vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøtið.
Fríggjakvøldið kl. 20 After8,
Sunnudagin kl. 11
Guðstænasta v/Jóhan P. Johannesen.
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Mánakvøldið kl. 20 Møti v/ Fólki frá Åbne døre.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Filadelfia**
Mikudagin kl. 16.30
Bøn Ísrael og býnum.
Fríggjakvøldið kl. 20
Mammur hittast til bøn.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 11
Morgunmøti, Mariann Jacobsen talar.
Kl. 13.15 SundagsKool
www.filadelfia.fo

**Lívdin í Skúlanum við Løgmannabreyt**
Sunnudagin kl. 10.30 byrjar Familju- og tilbiðjanarmøtið og lovsonur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli og unglív eisini kl. 12. Á seinna møtinum kl. 12, vitjar Ian Burness frá enska trúboðarafelagsskapinum "Echoes of Service". Hann sigur eitt sindur um felagsskapin og talar um "missión". Hjartaliga vælkomin. www.livdin.fo

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Mikukvøldið kl. 20 møti Brad og Lin av Teivan og Ole Sørensen Norea Radio greiða frá.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Annu Nesá.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti. Barnanasing er undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin.
Fríggjakvøldið kl. 19; Kongsins Herlið, møti fyri børn 8 ár og uppeftir. Øll verða koyrd heim eftir møtið. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Hesuferð er tað felagsungdómsmøti saman við ungdómi úr Getsemane úr Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Barnansing er undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagur kl. 19 í KFUM:
Ten-sing kórið venur.

**Gongutúrur**
Sunnudagin verður gongutúrur: Malinsfjall á Viðareiði. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 10. Túrurin er tungur og brattur í støðum. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan munn við. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425.

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum týskvøldið 21. sept. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Gal. 3,15-29. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Asbjørn Joensen og fl. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta verður hóskvøldið kl. 19.30. Vikuskiftismøtir verða leygarkvøldið kl. 20 har Árni Kjørbøk og Dorup Johansen tala. Magda og Maibritt syngja. Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14. Møti kl. 18 har Hjalgrím Davidsen og Henry Poulsen tala og Herman Winther syngur. Øll eru vælkomin

**Hjúnabandsskeið við Steen Palmqvist**
Fríggjadagin 15. sept. og leygardagin 16. sept., hevur Steen Palmqvist hjúnabandsskeið í Kelduni í Skálafirði. Kostnaðurin er 200,- kr. fyri hvønn íroknað døgurða og drekka. Tilmelding á tlf. 742054, 581512 og á telduposti tvorfoss@kallnet.fo
Sí annars á www.keldan.fo

**Lívsins Ord, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30
Bønarmøti. Kl. 20.30
Ungdómsmøti.
Hósdagin kl. 17.30 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

**Missiónshúsið á Strondum**
Sunnukvøldið kl. 18
Símun P Joacobsen

**Missiónshúsið í Rituvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 19 Juniorringur.
Leygarkvøldið kl. 20
Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14
Sunnudagsskúli. kl. 18 Møti við Bergi D. Joensen. Innsavnan til UBS í India. Drekka verður eftir møti.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 19.30 samlast dreingjabólkurin.
Hóskvøldið kl. 20.
ungdómsmøti v/ Åbne døre
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti. Tú ert vælkomin.
www.solideogloria.fo

**KFUM & K í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími
Fríggjakvøldið kl. 19.30
Vikuskiftismøti við Hanus á Gørðum "Kann Guð tala, sum á døgum Elia?"
Leygarkvøldið kl.19.30
Vikuskiftismøti við Pól Jóhannessen "Tora vit at líta á Guð, sum Elia?"
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta kl. 18 Vikuskiftismøti við Pól og Hanus "Viðgongd og mótgongd". Kl. 21 Ungdómsmøti

**Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Onki ungdómsmøti, vegna møti í Immanuel í Havn.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti Barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mikudagin 15. sept. kl. 14.30
Barnakór.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Silas Olufson.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
*Opið: mánadag-hósdag*
*kl. 9-17 og fríggjadag kl. 9-16.*
Hósdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar. Kl. 14 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Fríggjadagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10 Bindiklubbur.
Kl. 14-16 Prát.
Skeið:
Matgerð týsdag kl. 10-13.30 Inga E. Torbjørnsdóttir byrjar í viku 39. Skeið er undir Tórshavnar Kvøldskúlaskipanin. Telduskeiðini verða lýst seinri.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst.*
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Viðrar hittast vit í Vágsbotni mikudagin 14. september kl. 15 til rundferð í gomlu Havnini. Aftaná kunnu fólk keypa okkurt leskiligt. Annars hittast við í Losjuni kl. 19.

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadag kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Eldrafelag Kumlá**
byrjar aftur eftir summarsteðgin og hevur hugnakvøld týskvøldið 14. sept. kl. 19.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagtilhaldið í Gøtubrá**
Vit eru farin í summarferiu.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.*
*Øll eldri eru vælkomin*

# Brúdleyp



Leygardagin 18. sept. kl. 14 giftast í Funnings kirkju Sasi M. Højsted, Funningur og Magni G. Joensen, Signabøur. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Brúðarhús verður á Signabø 10, Sunnudagin 19. sept. frá kl. 17. Øll hjartaliga vælkomin.

25. sept. giftast í Hvalbiar kirkju kl. 15, Halldis Múller úr Hvalba og Bergtórur Bjarkhamar úr Vági. Tey, ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið, eru vælkomin á Eiðisveg 24 í Vági eftir kl. 18.

10. okt. giftast Laila Petersen og René Havmand. Víglsan verður í Vesturkirkjuni kl. 9. Vælkomst verður í hølunum hjá Dansifrøði frá kl 12-16. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum vera biðin um at siga frá á lrh@mail.fo ella 230221 (René) áðrenn 1. okt.



Sunnudagin 10. okt. giftast Mia Johnsdóttir og Dánial A. Hansen, Miðvágur. Vígslan verður í Miðvágs kirkju kl. 14. Døgurði verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 16.30. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 29. sept. á tlf. 333028 ella 332494.

Sunnudagin 10. okt. giftast Laila Petersen, Klaksvík og René Havmand, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 9. Eftir vígluna verður vælkomst í hølunum hjá Dansifrøði frá kl. 12-16. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum verða biðin um at siga frá áðrenn 1. okt. við at skriva til lrh@mail.fo ella ringja 230221 (René).

Leygardagin 23. okt. giftast Fía Guttesen, Tórshavn, og Lennard J. Myllhamar, Sandavágur. Vígslan verður í Sandavágs kirkju kl. 15 og veitslan verður í Pálsstovu, Tórshavn kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við koma, verða biðin at siga frá innan 3. oktober á tlf. 253572 (Fía) / 225879 (Lennard) ella 333399.

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag frá kl 14-17.* Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit eru farin í summarferiu.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
*dagtilhaldid@post.olivant.fo*
*Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30*
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.
Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Er opið týsdag og hósdag frá kl. 15-18. Øll eru vælomin.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
*Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í líkaviku frá kl. 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.*
Ogur møtast aftur í ólíka viku til somu tíð og sama stað.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

**BERIN – Sjálvhjálparbólkar**
fyri børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin.
info@berin.fo - www.berin.fo